# ENTAR OG EITURKOPPAR

*TEY BÆÐI TORNINI - annar partur av Ringanna Harra eftir J.R.R. Tolkien*

*Hanus Kamban*



*Axel Tórgarð við enn einum megnarverki*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Skaldsøgan Ringanna Harri kann líknast við eitt veldugt gonguverk við einum ótali av størri og smærri hjólum - hendingum, ríkjum, málum og verum. Tann dýnamo, sum drívur urverkið, er Ringurin Eini, sum í megi ber av teimum trimum ringunum hjá álvunum, teimum sjey hjá dvørgunum og teimum níggju, sum menniskjuni fingu.

Í fyrsta parti av skaldsøguni - sum fatar um fyrstu og aðru bók, og sum kom á føroyskum í fjør - varð løgd fram fyri lesaran søgan um, hvussu hesin gripur, sum Sauron hevði smíðað, endaði í hondunum á einum av hobbunum, tí minst eftirgáaða fólkinum í Miðgarði. Á ráðstevnuni hjá Álvrádna í Klivdali varð gjørt av, hvat skuldi gerast við ringin, og hvør skuldi vera ringberi, og sostatt lósu vit um, hvussu teir níggju í ringliðnum fóru undir sína drúgvu ferð. Við brúnna í Khasad-Dûm í Moriafjøllum fell teirra vegvísari Gandálvur Grái, í bardaga við balroggin, niður í dýpið og varð ikki sæddur aftur. Tá ið liðið kom til Raurosfossin í ánni Anduin, varð Boromir, sonur valdsharran í Gondor, feldur av fjallatussum. Samstundis syndraðist ringliðið í tríggjar partar.

Annar partur av Ringanna Harra - TEY BÆÐI TORNINI, latin í fyrimyndarliga vakran føroyskan nútíðarbúna - var at fáa í bókhandlunum frá í gjár. Í hesum parti fylgja vit, í triðju og fjórðu bók, teimum trimum bólkunum á teirra ferð longur inn í sagnarheimin hjá Tolkien. Søgan er spennandi og ævintýrkend, men kann eisini - við tað at skaldið drálar uppi yvir landsløgum og gróðri - viðhvørt tykjast villingarsom, og hetta seinasta er nettup við til at geva henni dýpd og veldi. Sum onkur minnist, valdi Fróði tann kost at fara einsamallur inn í Mordor við ringinum, uttan at hinir vistu, hvar hann fór. Tað lukkaðist hansara trúgva tænara Sam at fáa hann aftur, og hetta gjørdist seinni hansara - og heimsins - bjarging. Pippingur og Káti vórðu tiknir av tussum, og teirra lagna lá eftir hetta í hondunum á sterkum og merkiligum skapningum.

Hvat ið viðvíkir hinum trimum, Legolasi, Aragorni og Gimla, so verður teirra leiklutur smátt um smátt - kundi ein kanska sagt - tvinnaður saman við teimum stórpolitisku viðurskiftunum í Miðgarði. Arvafíggindar eru Mordor og tað forna ríkið Gondor. Men hvørja støðu skal tað til tað unga ríkið Róhan, har stoltir og vakrir reiðmenn norðanífrá búgva, velja í hesi orrustu, og, ikki minst, hvønn kost velur Saruman hin Hvíti, gandakallurin í Ísgarði? Legolas, Aragorn og Gimli eru leingi í villareiði, men tá ið Gandálvur Grái vísir seg á øðrum sinni, verður táttað í teir hugmyndafrøðiligu teymarnar, og Ormstunga, ið sum ein annar Gýðin jallur sýgur máttin úr Harranum í Róhan, verður avdúkaður. Hesin partur av ringbardøgunum verður gjørdur av í orrrustuni við Helmars Dýpi og í entanna kvørkrataki um Ísgarð. Saruman er nú, eins og tann ikki minni stuttskygdi Mussolini í 1943, farin úr spælinum. So langt kemur annar partur í síni stórpolitisku viðgerð. Søgan um endabrestin - har Gondor og Róhan, álvar, dvørgar, menn og hobbar fylkjast ímóti Sauron, og har Gondors sanni harri aftur sessast í sínum hásæti - verður søgd í triðja og seinasta parti (fimtu og sættu bók), sum kemur út næsta ár.

Tey, sum hava sæð teir tríggjar filmarnar hjá Peter Jackson - og tey eru mong - hava helst eina hylling á hesi gongd. Filmarnir eru væl snaraðir, men far ikki skeivur, kæri lesari, í skaldsøguni er sevja og stemningur, litur og poesiur, sum einki filmsverk kann endurskapa. Fyri bara at taka eitt dømi, so dró rithøvundurin gyltan fong, tá ið hann - við innblástri frá tí angulsaksiska orðinum ent (og, siga bókmentafrøðingar okkum, í kapping við Shakespeare, sum í *Macbeth* letur hetjuna halda, at Birnam skógur gongur til Dunsinane) - kveikti ta merkisverdu søguna um entarnar, ið sum ein vistfrøðilig persóngerð vakna úr dúri, fara til gongu og gera upp við skógarfellaran Saruman. Ikki minni hugtakandi er frásøgnin hjá Gandálvi um ferðina niður í deyðsríki, haðani hann kemur aftur sum ein annar Óðin ella Orfeus, vísari og sterkari, sum menniskja, ið hevur sæð feigdina í eyguni og vunnið á djúpari kreppu.

Men minniligast eru lýsingarnar av landsløgum og vøkstri: fløtur og fjøll, kluftir og áir, sólsetur og sólarris, driv og pollamjørki, ófrættakendur skýdráttur, reyn og brekkur, sum eru berkað og gróðrarpínd av meinfýsni, og kanska serliga tað grøna, silkimjúka grasið í Róhan, sum okkara hetjur vaða í upp til kníggja, alt hetta hevur Tolkien lýst gjøgnum eina søguskygda litprismu og við eini sjarmu, so eingin ger honum tað eftir. Vit eru her stødd í tí tíðarleysa heiminum hjá Nornagesti og Høgna Gjúkasoni:

*Vær ríðum so fram á Fávnis ból,*
*Har skein gull, sum geisar av sól*
...

Meðan triðja bók skiftandi greiðir frá ferðini hjá Pippingi og Káta og hjá Legolasi, Aragorni og Gimla, er fjórða bók burturav halgað ferðini hjá Fróða og Sam fram við Emyn Muil fjøllum, tvørtur um mýrarnar og oman ímóti Minas Morgul í Mordor. Í hondunum á lakari skaldi kundi frásøgnin her blivið ov eintáttað, men Tolkien hevur sjáldsamar gávur at halda spenninginum uppi við alsamt at lata landslagið skifta og við at lata tann myrknandi skuggan úr Mordor vaksa um angistarkenslu og ófrættadám. Samstundis følist tað sum eitt frábregðilsi, tá ið okkara smáu kappar av tilvild renna seg í Faramir, tann yngra sonin hjá Gondors uppsitara, og hansara menn. Munurin í lyndi millum Faramir og tann eldra beiggjan Boromir fær avgerandi týdning fyri søguna og fyri ferðina hjá Fróða og Sam. Og skuldi lesarin havt okkurt at funnist at og kanska linkað eitt sindur, so fær hann rættiliga kaldasveittan fram í teimum seinastu kapitlunum, har Fróði og Sam hitta tað eiturkoppakenda ódjórið Shelob, og har skaldið í síni lýsing av fúlum, stinkandi óndskapi yvirgongur seg sjálvt.

Men tað, sum fyrst og fremst gevur hesi fjórðu bók dýpd, er ein annar persónur, sum lesaran longu hevur varnast var á veg, men sum hann seinast hitti, ikki í Ringanna Harra, men í Hobbanum. Hetta er sjálvandi Golli, sum á ungum árum læt seg tøla av ringinum út í siðaligt óføri, sum leingi bøldi yvir ringinum í bleikari einsemi, sum síðani misti hann, og sum nú bara hevur ein longsil: at fáa ringin aftur. Søgan um tríkantin Fróða, Sam og Golla er áhugaverd sálarfrøðiliga, men ikki minni átrúnaðarliga. Sam er tann raski og djarvi, sum ikki hevur tol við lúnskum illmennum, Fróði er djúpari kveiktur, hann er Fróði Friðargóði, hann sum gongur undir menniskjans óndskap og næstan hoknar undir byrðuni, og sum megnar at várkunna eisini skaparans brotnastu kørum, og tí eisini Golla. Og kanska er tað myndin av hesum seinasta, sum hevjar Ringanna Harra upp um vanligan sveimlesnað, tí í henni hómast sami farri av grið, endurloysn næstan, sum eisini eyðkennir Caliban-lýsingina í *Harðveðrinum* eftir Shakespeare. Soleiðis verður greitt frá, tá ið Fróði sovnar í fanginum á Sam, og Golli kemur fram á teir báðar:

*Eitt løgið bragd fór um hansara soltna, svanga andlit. Glæman hvarv úr eygum hansara, og tey gjørdust dimm og grá, gomul og móð. Tað var, sum ein knapplig pína fór ígjøgnum hann, og hann vendi sær burtur, hugdi niðan á skarðið og risti við høvdinum, sum hevði hann onkra samrøðu við seg sjálvan. So kom hann aftur, og spakuliga rætti hann út eina ristandi hond og nam sera varisliga við knæið á Fróða - tað var, sum kíndi hann honum. Hevði ein av teimum sovandi sæð hann í hesi lítlu løtuni, vildi hann hildið, at hann sá ein gamlan troyttan hobba, farnan av árunum, sum høvdu borið hann langt út um tíð hansara, út um ætt og vinir og ungdómsins áir og markir, eitt gamalt, hungrað neyðarsligt skepilsi.*

Skal til seinast verða nevnd ein onnur orsøk til, at vit við Ringanna Harra standa yvir av einum sonnum klassikara, so er tað tann, at henda skaldsøga, so long hon er, er sum tann fyrsta sýnin dagandi sum frá líður ímóti einum nógv víðari og eldri landslag: sýn aftan á sýn av søgn, mýtu, fólkasløgum, málum og mentanum. Ein kann tí siga um persónarnar í bókini, at teir allir hava langan skugga, daga á einum trídimensjónalum lørifti, so at ein, meðan lisið verður, í heilum fær hug at kveita í eitt annað verk eftir Tolkien - *The Silmarillion* - har fortalt verður, sum í *Heimskringlu*, um skapanarsøgu og ættarsøgu, um ljósálvar og svartálvar, um málini Quenya og Sindarin og um Nûmenor, álvanna ríki, haðani ein farri viðhvørt, í *Ringanna Harra,* sæst skína á Aragorn og Fróða. Sum mimetiskt verk er *Ringanna Harri* sostatt, við at hon endurgevur heimsins veruliga kompleksitet, merkisverd.

*J.R.R. Tolkien: Ringanna Harri. Annar táttur: TEY BÆÐI TORNINI. Axel Tórgarð týddi. Kápumynd eftir Trónd Patursson. Kr. 350. Forlagið Stiðin gav út.*

# Politisk ætlan

**TINGHELLUKLUMMAN**
*Finnbogi Ísakson*



Mær tykir, at heldur lítið kjak hevur verið í fjølmiðlunum um ta stóru ætlan, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur við Landsbankanum og Hagstovuni. Stjórin, nevndin og umsjónarráðið hava havt eina góða frágreiðing í bløðunum um virki Landsbankans, og Kjartan Kristiansen hevur skrivað eina góðan grein um evnið. Annars hevur verið deyðatøgn. Er málið ov torført fyri journalistarnar ella hvat er tað?

Hetta er nevniliga eitt stórt mál, og tey tykjast annars at tróta hjá hesari samgonguni. Landsstýrismaðurin ætlar at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman, og at leggja tey undir Fíggjarmálaráðið. Sum er hoyrir Hagstovan undir Fíggjarmálaráðið, meðan Landsbankin er óheftur av politiska valdinum og verður stýrdur av einum umsjónarráði, einari nevnd og einum stjóra.

Høvuðsuppgáva Landsbankans er at røkja tær uppgávur, sum Tjóðbankar hava í øðrum londum. Sjálvandi innan fyri tey mørk, sum Heimastýrislógin setir.

Landsbankin er óheftur av politiska valdinum. Longu í grein 1 í lógini um Landsbankan verður sagt, hvussu hann skal stýrast:

Bankin skal stýrast av einum umsjónarráði, einari nevnd og einari stjórn.

*Stk. 2. Umsjónarráðið telur 11 limir, sum eru:*
*a) 5 limir valdir av Føroya Landsstýri eftir tilmæli frá Búskaparráðnum, harav minst ein skal vera búskaparfrøðingur, og ein skal vera løgfrøðingur. Hinir skulu umboða hvør sína vitan um samfelag og búskap.*
*b) 6 limir valdir av vinnufeløgum. Teir skulu hava hollan kunnleika til vinnuviðurskifti. Hesir limir kunnu ikki vera tinglimir. Teir skulu umboða vinnuna og tey, ið starvast í henni, á fjølbroyttan hátt. Føroya landsstýri ásetur við kunngerð, hvussu nevndu 6 limir verða valdir.*
*c) Limirnir í umsjónarráðnum verða valdir fyri eitt 5 ára skeið. Fer limur frá, áðrenn valskeiðið er runnið, verður nýggjur limur valdur fyri restina av skeiðinum. Umsjónarráðið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni fyri 1 ár í senn.*
*Stk. 3. Nevndin telur 5 limir, sum eru:*
*a. Teir 2 undir stk. 2 nevndu, sum skulu hava ávikavist løgfrøðiligan og búskaparligan kunnleika.*
*b. 3 limir valdir av umsjónarráðnum við vanligum meiriluta*
*c. Nevndarlimirnir verða valdir fyri 1 ár í senn.*
*d. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni. Formaðurin og næstformaðurin kunnu ikki hava tilknýti til bankar ella sparikassar.*
*Stk. 5. Landsstýrið hevur eftirlit við, at bankin lýkur skyldur sínar sambært hesa lóg og viðtøkurnar.*
*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur rætt til at luttaka á fundum í umsjónarráðnum og í nevndini og til at fáa tær upplýsingar frá nevndini um viðurskifti bankans, sum hann biður um.*
*Nevndin kann ikki taka avgerð í málum av serligum týdningi, uttan so at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frammanundan hevur fingið boð um, at viðkomandi mál skal viðgerast.*

Tað er heilt skilligt, at Landsbankin er óheftur, men at hann heldur ikki kann taka avgerðir uttan so, at landsstýrismaðurin veit av. Hetta er sama skipan sum í okkara grannalondum. Tó undraði tað meg, tá bankakreppan og onnur kreppa herjaði í Føroyum fyri 12-14 árum síðani, at danski Tjóðbankin var so tætt knýttur at stjórnini.

Tað var samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin frá 1975-79, sum gjørdi lógina um Landsbankan. Frammanundan høvdu tveir danskir serfrøðingar gjørt eitt tilmæli, sum Landsstýrið fylgdi í sínum lógaruppskoti. Annar serfrøðingurin, Bodil Nyboe-Andersen, er nú forstjóri í danska Tjóðbankanum. Tað tók tó níggju ár frá tí, at lógin varð samtykt, til Landsbankin varð settur á stovn.

Tjóveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin vóru altráir eftir at fáa ein landsbanka. Fólkaflokkurin var heldur ullintur.

Tjóðveldisflokkurin vildi hava ein tjóðbanka, sum skuldi hava heimild til at áseta kursvirðið. Tað var vanligt tá í tíðini, at krónuvirðið varð brúkt sum partur av fíggjarpolitikkinum. Best kenna vit hetta úr Íslandi, men tað hevur eisini verið nógv brúkt í øðrum londum, eitt nú í Bretlandi og Fraklandi í sekstiárunum og í Danmark í seinnu helvt av sjeytiárunum. Summir tjóðveldismenn droymdu um egið gjaldoyra, sum kundi verið niðurskrivað so mikið nógv, at ríkisstudningurin varð óneyðugur.

Javnaðarflokkurin vildi hava ein landsbanka, sum hevði tær nevndu uppgávurnar, men eisini hevði inn- og útlánsvirksemi.

Fólkaflokkurin var trekur, tí hann stúrdi fyri, at ein landsbanki fór at kappast við teir privatu bankarnar.

Sambandsflokkurin var hart ímóti, tí flokkurin kendi seg fullvísan í, at hetta var eitt týðandi stig fram ímóti loysingini og einum tjóðbanka, sum fór at lækka kursvirðið.

Nú sita Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin í samgongu. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er sambandsmaður og tekur tráðin upp: at taka Landsbankan av. Kunna hinir báðir flokkarnir í samgonguni, sum tóku tað megnartak at stovnseta Landsbankan, liva við tí?

Eg kann ugga sambandsmenn við tí, at Tjóðveldisflokkurin hevur - mær vitandi - onga ætlan longur um at fáa eitt føroyskt gjaldoyra við lágum kursi. Tvørturímóti harmaðist flokkurin um, at Danmark ikki góðtók evruna sum gjaldoyra. Á hesum øki haldi eg, at er altjóðarákið rætt: eitt felags, stabilt gjaldoyra.